10 Sosialurin Hugskot og viðmerkingar – send sms til 225000 Mikudagur 16. juli 2014 · Nr. 80

VIT VERÐA IKKI TIKIN Í ÁLVARA

Í níggju ár hava vit spurt, hvat hendir, tá Tróndur verður 18 ár. Kortini tykist tað, sum tað kemur óvart á myndugleikarnar, at hann nú er liðugur við skúlan, sigur mamma Trónd Álvsson, Sóley Hórðará. Virðingin fyri teimum veiku í hesum samfelagnum manglar, heldur hon

Í juli prentaðu vit eina grein um Trónd Álvsson, sum júst var fyltur 18 ár, men ongastaðni hevði at vera, tá Skúlin á Trøðni var liðugur. Hann hevði heldur ikki fingið pensión, hóast at hann bleiv 18 ár í marts. Foreldrini vóru sera móð av at møta mótsøðu alla tíðina, og kendu tað sum, at virðingin fyri teimum veiku í samfelagnum manglar.

Ein trupulleiki, sum foreldrini gjørdu vart við, var, at tað var ringt at fáa ein fund í lag við Almannaverkið, tá tað nærkaðist, at Tróndur skuldi gerast 18 ár. Hetta var ein orsøk til, at foreldrini ikki søktu um pensión fyrr enn í januar. Tey bóðu um ein fund við Almannaverkið fýra mánaðir áðrenn, Tróndur fylti 18 ár. Hetta eydnaðist tó ikki, fyrr enn tveir mánaðir seinni.

Hóast umsóknin varð latin inn í januar, hevur Tróndur ikki fingið pensión fyrr enn í september, og vísir tað seg nú, at Almannaverkið hevur tikið ein mánað av pensiónini. Av tí, at foreldrini ikki søktu um pensión fyrr enn í januar, verður pensiónin fyri ein mánað tikin frá honum. Orsøkin er, at umsóknin skal latast inn tríggjar mánaðir áðrenn ein persónur fyllir 18 ár.

Tróndur fær ikki alla pensiónina

Almannaverkið hevur tikið eina mánað av pensiónini hjá Tróndi Álvsson, av tí at foreldrini ikki søktu tríggjar mánaðir áðrenn hann fylti 18 ár. Foreldrini søktu so skjótt sum tað var eydnast teimum at fáa ein fund við Almannaverkið, sigur mamman, Sóley Hóðrará

Marjun Dalsgaard

Hóast Tróndur Álvsson fylti 18 ár í marts 2014, og foreldrini hava søkt um pensión í januar 2014, varð pensiónin ikki avgreidd fyrr enn í august. Tá vit tosaðu vi Sóley Hóðrará í farnu viku, hevði hann enn ikki fingið sína pensión, men nú er hon so loksins komin.

Trupulleikin er bara, at har manglar ein mánaður.

Foreldrini settu seg í samband við myndugleikarnar fýra mánaðir áðrenn Tróndur fylti 18 ár, men tað eydnaðist teimum ikki at fáa ein fund við Almannaverkið fyrr enn í januar 2014. Tá tey høvdu verið á fundi við Almannaverkið, søktu tey um pensión til Trónd alt fyri eitt, men hetta var eftir øllum at døma ov seint. Av tí, at tey ikki hava søkt um pensión fyrr enn í januar 2014, hevur Almannaverkið nú trekt ein mánað av pensiónini hjá Tróndi.

- Vit vóru ikki greið yvir, at ein regla er, sum sigur, at tú skalt søkja um pensión tríggjar mánaðir, áðrenn barnið verður 18 ár. Vit søktu, so beint sum vit høddu havt ein fund við Almannaverkið, og tað var so eftir øllum at døma ov seint, sigur mamma Trónd, Sóley Hóðrará.

Mugu søkja um pensión

Hallur Thomsen, stjóri á Menningardeplinum, varðar av pensiónsviðurskiftunum hjá fólki við menningartarni, og hann er harmur um støðuna.

- Eg kann siga yvirorðnað, at vit hava eina tilgongd, sum skal tryggja, at hetta ikki hendir, men vit kunnu bara staðfesta, at tað ikki er eydnast her, sigur hann.

Lógin sigur, at øll skulu søkja um pensión, so hóast Tróndur hevur verið inni í skipanini hjá tí almenna, síðani hann var tvey ár, og tey kenna hann, skal hann søkja um pensión og í sama viðfangi gera sannlíkt, at hann ikki er arbeiðsførur.

Tróndur hevur rætt til pensión frá tí, at hann er 18 ár, men tað er ikki nøkur trygd fyri, at hann fær hana frá sínum 18 ára degi. Neyðugt er at søkja tríggjar mánaðir áðrenn føðingardagin. Gert tú ikki tað, missir tú tilsvarandi. Sostatt missir Tróndur ein mánað av pensiónini, tí foreldrini søktu ein mánaða ov seint.

Fingu ikki fund við Almannaverkið

Eitt av evnunum, sum Sosialurin skrivaði um, í sambandi við greinina um Trónd í Sosialinum 15. juli, var júst, at tey ikki fingu ein fund í lag við Almannaverkið.

Sostatt segði mamma Trónd í tí sambandi, at hon hevði spurt myndugleikarnar í fleiri ár, hvat fór at henda, tá Tróndur gjørdist 18 ár. Foreldrini hava altíð fingið tað svarið, at myndugleikarnir skuldu hyggja uppá tað, og at foreldrini fóru at verða kallað til fundar hesum viðvíkjandi.

Fundarboð komu tó ongantíð, og fýra mánaðir áðrenn, Tróndur gjørdist 18 ár, settu foreldrini seg sjálvi í samband við Almannaverkið. Tað tók tveir mánaðir at fáa ein fund í lag, og tað var eftir hetta, at foreldrini søktu um pensión – eftir øllum at døma ein mánaða ov seint.

Kunnu ikki passa sítt arbeiði

Síðani vit skrivaðu greinina um Trónd, hevur hann fingið pláss á varda verkstaðnum Virkni. Stóri trupulleikin hjá foreldrunum var, at Tróndur ikki hevði nakað stað at vera eftir, at skúlin endaði. Trupulleikin var ikki bert, at Tróndur ikki fekk ein innihaldsríkan gerandisdag, men foreldrini mangladu simpulthen ansing. Tey høvdu tann praktiska trupulleika, at ongin var, at vera hjá Tróndi og tey fingu tískil ikki passað sítt arbeiði.

Tann praktiski trupulleikin er ikki loystur, hóast Tróndur hevur verið á Virkni síðani 1. september. Hann kann ikki avleverast hjá Virkni fyrr enn kl 8.30, og tey skulu eftir honum aftur klokkan 15.30 allar dagar uttan týsdag, tá steingir longu klokkan 13.30.

- Hetta er ikki nøkur loysn fyri okkum. Tað ber slett ikki til, sigur mamma Trónd. Tey búgva í Vestmanna, og Tróndur koyrir við manni hennara til Havnar hvønn morgum. Fyri at fáa tingini at passa saman hevur hann mist seks arbeiðstímar hesa vikuna.

Sóley hevur roynt at finna eina loysn, sum inniber, at Tróndur verður avleveraður á einum sambýli, har tey, sum búgva har, eisini skulu til Virkni, og sostatt kann koyra við teimum til Virkni, men hetta ber ikki til, tí bert eitt starvsfólk er til arbeiðis um morgunin. Í heila tikið er tað tungt fyri mammuna.

- Tað er alið okkurt, og eg sakni, at onkur hugsar eina loysn, og sigur, soleiðis og soleiðis skulu tit gera. Vit fáa bara at vita, at vit skulu spyrja okkum fyri sjálvi, og vit mugu sjálvi royna at finna eina loysn, sigur hon.

Fara at broyta upplatingartíðir

Á Trivnaðardeplinum siga tey, at tey eru klár yvir trupulleikan við upplatingartíðunum hjá Virkni, og at tey eru í holt við at loysa trupulleikan.

- Eg havi ein fund við tey á Virkni mánadagin, og tá fara vit at tosa um, hvussu vit loysa trupulleikan, sigur Fríðgerð Sundskarð, sum arbeiðir við økinunum. Hon heldur ikki, at tað er nøkur loysn fyri Trónd, at hann skal koyrast fleiri støð, og tískil má ein loysn finnast, har hann kann avleverast og heintast soleiðis, at foreldrini kunnu passa sítt arbeiði kortini. Hetta er ein nýggjur trupulleiki, sigur Fríðgerð Sundskarð.

- Hetta er ein stórur trupulleiki í ár, bæði í Suðurstreymoy og Eysturoynni, men tað hevur tað ikki verið fyrr, sigur hon.

Orsøkin er, at nógv av teimum, sum hava brúkt Virkni, hava búð í sambýlum, og tey sum hava búð heima hava havt onkra aðra loysn.

- Hetta hevur ikki verið ein trupulleiki áður, men vit loysa hann nú, sigur Fríðgerð Sundskarð.